# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Pakistan er hótt og kann fara í upploysn, verða tær víðgongdu kreftirnar í landinum ikki steðgaðar*
*David Petraeus, generalur*

# Knívurin fór 13 cm inn í høvdið




*Røntgenmyndirnar vísa, at alt blaðið fór innum*

*Mynd: Reuters*

**Ein 16 ára gamal drongur í London slapp livandi frá einari knívsstungu í pannuna**

Tann 16 ára gamli drongurin bleiv stungin í høvdið, tá hann og tveir vinmenn royndu at forða einum innbroti í býarpartinum Walworth í London. Ein av innbrotsmonnunum stakk tann 16 ára gamla í pannuna.

Hann bleiv alt fyri eitt koyrdur á sjúkrahús, og har vístu røntgenmyndir, at knívurin var farin 12,7 centimetrar inn í høvdið. Kortini slapp drongurin frá álopinum uttan størvegis mein. Læknanir siga tó, at hann skal koma á sjúkrahúsið til kanningar nakrar ferðir.

Løgreglan tók ein 17 ára gamlan og skuldsetti hann fyri at hava stungið tann 16 ára gamla. Hann er dømdur og bíðar nú eftir revsingini, sigur BBC.

Tilburðurin er bara ein av mongum, sum hava verið í London í seinastuni, og sum hava kostað fleiri ungum lívið.

## STUTT SAGT

### Palin missir undirtøku

Sambært amerikonskum fjølmiðlum hevur republikanska forsetavalevnið, John McCain, biðið sítt varaforsetavalevni, Sarah Pahlin, leggja størri dent á at lýsa tey ymsu viðurskiftini, tá hon fær spurningar frá tíðindafólki um mangt og hvat.

Tað er almenn uppfatan, at Sarah Palin hevur ofta verið ógvuliga óneyv og grunn, tá hon hevur svarað spunringum frá tíðindafólki, men sambært sjónvarpinum NBC vil McCain hava hana at vera meiri neyva í framtíðini.

Meiningakanningar í USA vísa, at Sarah Palin er ikki so væl umtókt nú, sum hon var, tá hon bleiv tilnevnd varaforsetavalevni. Tá vísti ein kanning, at tey, sum hildu av henni, vóru 20 prosernt fleiri enn tey, sum ikki hildu hana vera egnaða, men sambært einari nýggjari kanning hjá NBC er hesin munurin nú tódnaður niður í seks prosent.

Millum annað vísir kanningin, at tað eru serliga teir kvinnuligu veljararnir, sum halda minni av henni nú.

### Pávin brúkar sólorku

Benedikt pávi og hinir leiðararnir í Vatikaninum hava gjørt av at brúka meiri sólorku fyri at spara pening, og fyri at Vatikanið kann ganga undan sum ein góð fyrimynd, tá tað snýr seg um ar brúka varandi orkukeldur og at verja umhvørvið.

Í hesum døgum eru menn í ferð við at seta ikki færri enn 2.700 sólskermar upp á takið á Vatikaninum, og burtur úr teimum væntar Vatikanið at fáa 300.000 kilowattímar um árið, sum so skulu brúkast til ljós og hita og til at køla.

Eitt nú er ofta neyðugt við køling, tá konsertir eru í tí stóra salinum, sum tekur 6.300 áhoyrarar, skrivar AFP.

### Stendur aftur í botni í Zimbabwe

Hóast semju millum stjórnarflokkin og andstøðuna um valdsbýtið gongst illa at skipa stjórn í Zimbabwe

Í gjár royndu teir báðir leiðararnir, Robert Mugabe, forseti, og Morgan Tsvangirai, andstøðuleiðari, at finna eina semju, men til fánýtis. Sambært keldum hjá andstøðuni endaði fundurin úrslitaleysur, tá Mugabe kom við einum uppskoti um, at andstøðan kann fáa nøkur minni týðandi málsøki at umsita.

- Eftir hansara tykki skal hansara flokkur umsita øll tey týdningarmestu málsøkini so sum figgjarmál, innanríkismál og lógarmál. Tað hevði gjørt andstøðuflokkin MDC til ein viðfáning í stjórnini, sigur ein andstøðukelda við BBC.

Mugabe hevur fyrr sagt, at tann nýggja stjórnin skuldi skipast fyrradagin, men sambært andstøðukeldum standa samráðingarnar í botni nú.

# Gorbatsjov skipar nýggjan flokk

**Mikhail Gorbatjov, sum var tann seinasti leiðarin í tí gamla Sovjetsamveldinum, ætlar sær at læra russar at brúka frælsið**

Tann nú 77 ára gamli Mikhail Gorbatjov hevur ongan hug at seta seg afturá, hóast árini eru komin. Við hjálp frá ríkmanninum Aleksandr Lebedev ætlar hann sær at stovna ein nýggjan politiskan flokk, sum skal vera óheftur av Kreml.

Mikhail Gorbatjov bleiv heiðraður um allan heiumin fyri at hava givið londunum í Eysturevropa demokrati, og í 1990 fekk hann Nobelfriðarheiðurslønina fyri arbeiði sítt. Men heima í tí gamla Sovjetsamveldinum var hann als ikki væl umtóktur, tí sovjetska upployesnin í 1991 gjørdi gerandisdagin hjá russum truplan við búskaparligum og politiskum ruðuleika. Tað sást eisini í 1996, tá Gorbatjov stillaði upp til forseta. Bara 0,5 prosent av veljarunum atkvøddu fyri honum.

Kortini er Gorbatjov eftir øllum at døma høvuðsmaðurin aftan fyri ein nýggjan flokk, sum hann skipar saman við ríkmanninum Aleksandr Lebedev. Og sambært Lebedev hevur Gorbatjov ein boðskap:

- Hann gav fólki okkara frælsi, men vit vita ikki, hvussu vit skulu brúka tað, skrivar Lebedev á heimasíðu síni sambært NTB.

Tann nýggi flokkurin hevur fingið heitið „Tann óhefti demokratiski flokkurin" og hevur sett sær fyri at virka fyri løgfrøðiligum og búskaparligum nýskipanum, fleiri óheftum fjølmiðlum og einum sterkari tjóðartingi. Sjálvur ætlar Gorbatjov sær ikki á ting, tí hann vil heldur hava yngri kreftir á politiska pallin, sigur Lebedev.



*Mikhail Gorbatjov er 77, men hevur ikki slept politikkinum*

*Mynd: Polfoto*